**MEGINFELAG ÚTRÓÐRARMANNA**
**Tlf. +298 751422**
**teldup.:** mu@mu.fo

Klaksvík, 4. apríl 2021

**Fiskivinnuráðið**
**Yviri við Strond 15**
**100 Tórshavn**

**Hoyringsskriv:** Um kunngerð um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroya Banka í 2022

*MÚ hevur fingið uppskotið til hoyringar. Fiskimálaráðnum kunnugt, so umboðar MÚ allan útróður - áhugamálini hjá bæði bólki 4 og 5. Eftirsum uppskotið leggur upp til, at bólkarnir verða viðgjørdir so ymiskt, so setur hetta MÚ sum felag í eina tvístøðu.*

*Hetta svarskrivið avspeglar tí uppfatanina, soleiðis sum umboð fyri bólk 5 í MÚ síggja kunngerðaruppskotið.*

## Fiskirættindi á landgrunninum hjá bólkunum 3, 4 og 5

Í 1994 ásetti løgtingið (§ 29) í lógini um vinnuligan fiskiskap (LVF), at bólkarnir 3, 4 og 5 áttu ávikavist 23, 27 og 24 % og 28, 28 og 30 % av heildarkvotuni av ávikavist toski og hýsu á føroyska landgrunninum (§ 5, stk. 2 nr. 1). Býtið tók støði í *ávísum* søguligum viðurskiftunum.

Í viðmerking til ásetingina um felagskvotur § 5, stk, 5 (lt. 1993 s. 391) framgekk, at innanhýsis prosentparturin (felagskvotan) av ávikavist toska- og hýsukvotuni var støðugur og at felags-kvotur í tonsum bert broyttust, um heildarkvoturnar (§ 5, stk. 2, nr. 1) broyttust.

Í 1996 varð kvotaskipanin útskift við fiskidagaskipanina. Í 1996 ásetti løgtingið í § 29 í lógini, at bólkarnir 3, 4 og 5 undir einum áttu 34.360 fiskidagar. Býtið millum bólkarnar (felagsfiski-dagarnir) vórðu ávikavist 3.040, 9.320 og 22.000 fiskidagar.

Umroknað til prosent, so var hetta ávikavist 8,9%, 27,1% og 64% av lógarásettu fiskidøgunum hjá bólki 3, 4 og 5.

Ávís avhendan (flytan) av fiskidøgum varð *loyvd og fór fram* úr bólki 4 til bólk 3 fiskiárið 2004/2005. Lógarásettu fiskidagarnir hjá bólki 4 undir einum minkaðu úr 8.468 fiskiárið 04/05 til 5.603 fiskidagar fiskiárið 05/06, meðan lógarásettu fiskidagarnir hjá bólki 3 vuksu úr 2.415 til 3.578 fiskidagar.

Seinasta tvey árini hevur aftur verið loyvt at flyta fiskidagar úr bólki 4 til bólk 3.

Tað hevur ongantíð verið loyvt at flyta fiskirættindi/fiskidagar frá bólki 5 til aðrar bólkar.

**Prinsippið um, at bert virkin feløg/fiskifør fáa fiskirættindi**

Í mai 1987 var skipanin við veiðioyvum knæsett í føroyskari fiskivinnufyrisiting. Endamáið við skipani var m.a. *at fyriskipa fiskiorku og harvið veiðitrýst á botnfiskastovnarnar á føroyska landgrunninum* (§ 1)

Av § 2 í 1987-veiðiloyviskunngerðini framgekk beinleiðis, at bert *virknu* feløgini/fiskiførini í 1987 fingu útskrivað fiskiloyvi í 1987 og árini hereftir.

Av 1993-veiðiloyviskunngerðini var eingin áseting um, at bert *virkin* feløg/fiskifør høvdu rætt til fiskiloyvi. Hinvegin so ásetti løgtingið beinleiðis í lógini um vinnuligan fiskiskap í 1994 (§ 29, stk. 2), at bert fiskifør í vinnu ella sum sannlíkt fóru í vinnu fingu rættindi tillutað.

Soleiðis helt løgtingið fast um grundleggjandi princippið um, at bert vinnuliga virkin feløg/-fiskifør fingu tillutað fiskirættindi og harvið rætt at fáa fiskiloyvi útskrivað. Við hesum var hetta principp nágreinað beinleiðis í lógarformi heldur enn í kunngerðarformi.

**Kunngerðaruppskotið**

Býti av fiskirættindum

Kunngerðaruppskotið leggur upp til, at:

- bólkur 3 og 4 undir einum fáa 150 línufiskidagar hvør (hesir verða lætnir sum egnir dagar og eru umsetiligir)
- at eigarar í bólki 5 fáa 30 fiskidagar (felagsdagar – snella/lína telur eins nógv) og roknaðir soleiðis, at hvør avreiðing telur sum ein dagur

Tá mest sannlíka effektiva fiskiorkan (tillutaðir fiskidagar x settir húkar pr. 24 tímar – sigling til og frá fiskileið) er útroknað (skjal 1), so leggur uppskotið upp til, at eigarar av fiskiførum í

- bólki 3 fáa tillutað 65-70 % av rættindunum
- bólki 4 fáa tillutað 26-28 % av rættindunum
- bólki 5 fáa tillutað alt millum 0 og 5,5 % av rættindunum

Býtið, sum kunngerðinleggur upp til, er eitt nýbrot. Tað er skjótt at staðfesta, at tað er stórur munur á søguliga býtinum millum bólkarnar (upprunaliga á leið triðing til hvønn bólkin) og so tað býtið, sum kunngerðin leggur upp til. Truplari er at skilja og fáa eyga á lógligu og sakligu

grundgevingarnar fyri hesi ógvusligu forskjóting – meira niðanfyri.

Veiðiloyvini

Kunngerðin leggur upp til, at verandi veiðiloyvir í einstaku bólkunum fáa tillutað fiskirættindi. Eingin áseting er í kunngerðini um, at rættarliga tóm og óvirkin feløg/fiskifør verða avskorin frá at fáa tillutað fiskirættindi – tvørturímóti.

Kunngerðin er soleiðis eisini á hesum økinum eitt nýbrot í fyrisitan av botnfiskarættindum og botnfiskiskapi á føroyska landgrunninum. Við kunngerðini verður eitt vinnuliga óvirkið felag/fiskifar í bólkunum 3 og 4 betri stillað, enn eitt virkið felag í bólki 5, tá tað kemur til rættindi.

**Lóglig og saklig fyrisitan**

Fiskimálaráðið eigur eingi fiskirættindi, men fyrisitur hesi fyri samfelagið Føroyar. Um Fiskimálaráðið brúkar royndirar hjá skipum í bólkunum 3, 4 og 5 á bankanum seinastu árini, so hevur hetta verið eitt gullnám, uttan mun til hvønn bólk (3, 4 og 5) talan hevur verið um.

Løggildisgrundreglan – tað at ein myndugleiki fyrisitur við heimild í lóg og í samsvari við lóg og annars tekur avgerðir á sakligum grundarlagi – er ein grundleggjandi fyrtreyt fyri eitt og hvørt rættarsamfelag.

Eingin ivi er um, at lógin um sjófeingi heimilar landsstýrismanninum at skipa rættindi og fiskiskap. Spurningurin er heldur, hvussu hann tryggjar sær, at fyrisitanin er í samsvari við lóg og at avgerðir annars eru sakligar.

Sum hoyringspartur kunnu vit bert fyrihalda okkum til tað tilfar, sum Fiskimálaráðið sendir út til hoyringar, í hesum førum kunngerðaruppskotið og viðhefta uppritið.

Ein kundi vænta, at tað í uppritinum varð útgreinað, hvussu ráðið kemur til sínar niðurstøður og hvat sakliga grundarlagið er fyri teimum, men so er ikki. Uppritið staðfestir stutt, hvør skipanin hevur verið og hvør ætlanin hjá landsstýrismanninum er.

Hettar reisir fleiri spurningar, eitt nú:

- Hví fylgir landsstýrismaðurin ikki lógarásetta bólkabýtinum á landgrunninum annars?
- Hvat er sakliga grundarlagið fyri at ikki at gera tað?
- Hvar í lógini um sjófeingi verður landsstýrismanninum heimilað at diskriminera vinnufeløg í kunngerð?
- Hvørjar sakligar grundgevingar liggja til grund fyri tørvinum á vinnuligu diskriminatiónini, sum framgongur av kunngerðaruppskotinum?
- Nær og í hvørjari nýggjari lógaráseting hevur løgtingið samtykt, at vinnuliga óvirkin feløg/fiskifør (tóm veiðiloyvi) *aftur* hava rætt til fiskirættindi?
- Hvussu grundgevur landsstýrismaðurin fyri, at hann í ávísum førum *lógliga og sakliga*

stillar vinnuliga ó-virkin feløg/fiskifør (tóm veiðiloyvi) betur enn vinnuliga virkin feløg í samband við tillutan av fiskirættindum?

Alt hetta átti sum ein sjálvfylgja at framgingið av uppritinum, soleiðis at allir aktørar, sum verða fevndir av kunngerðini, reelt kunnu fyrihalda seg meiningsfult til tilfarið.

**Niðurløga**

Vit heita staðiliga á landsstýrismannin um ***ikki*** at lýsa kunngerðina við verandi orðing. Kunngerðin leggur upp til, at feløg/skip í bólki 3 og 4 fáa rættindini á bankanum, sama um tey eru virkin ella ikki. Harumframt leggur hon upp til eitt býti, sum fullkomuliga avlagar søguliga býtið bólkanna millum. Í hesum liggur eisini ein diskriminatión, sum landsstýrismaðurin ikki hevur grundgivið fyri.

Vit meta ikki, at uppskotið er í samsvari við lógina ella andan í lógini um sjófeingi og heldur ikki í samsvari við søguliga fyrisitan av føroyskum botnfiskarættindum. Vit fara at heita á landsstýrismannin um

- at halda seg til lógarásetta býtið bólkanna millum, galdandi fyri landgrunnin, og
- at halda seg til tað einaferð lógarásetta prinsippið um, at vinnuliga *ó-virkin* feløg/fiskifør (tømd veiðiloyvi) ikki fáa tillutað nýggj fiskirættindi

Virðingamest

Meginfelag Útróðrarmanna (MÚ)

Ps. Skrivið verður sent til lms@lms.fo